UTTAN ÚR HEIMI

## USA revsar Týskland

Amerikanska verjumálaráðið hevur samtykt at avlýsa fleiri íløgur, sum ætlanin var at gera á teimum amerikansku herstøðunum í Týsklandi. Talan er um fleiri byggiætlanir, og avgerðin fer serliga at raka økið Rheinland-Palatinate, har USA hevur fleiri herstøðir.

Týski verjumálaráðharrin, Peter Struck, avsannar, at amerikanska avgerðin hevur nakað samband við týsku mótstøðuna ímóti USA í Irak-málinum, men eygleiðarar ivast ikki í, at júst týska mótstøðan er orsøkin til, at amerikanarar skerja sínar íløgur í Týsklandi.

Fyri fjúrtan døgum síðani skrivaði bretska blaðið The Observer, at USA fer at taka sínar hermenn og herstøðir úr Týsklandi, og at amerikanararnir ætla at kvetta alt hernaðarligt samstarv við Týskland, aftur fyri at stjórnin hjá Gerhardi Schrøder, kanslara sýtir fyri at styðja USA í Irak-málinum.

## Clinton nevningur

Fyrrverandi amerikanski forsetin, Bill Clinton, kann gerast limur í einum nevningatingi, sum skal døma í einum rættarmáli í New York.

Eins og hini evnini fekk Clinton eitt spurnarblað at fylla út. Spurningarnir snúðu seg um ymisk persónlig viðurskifti, men navnið á honum, sum fylti spurnarblaðið út, stóð ikki uppi á tí. Tað, sum kortini avdúkaði Clinton, var spurningurin um fyrrverandi størv, tí har hevði viðkomandi skrivað: Forseti í USA.

Sakførarin hjá Bill Clinton, David E. Kendall, sigur, at fyrrverandi forsetin er til reiðar at taka sæti í rættinum, fær hann boð um tað. Men tað er kortini ivasamt, at hann verður valdur, tí dómarin ber ótta fyri, at fjølmiðlarnir fara at gera alt ov nógv burtur úr rættarmálinum, verður Clinton millum nevningarnar.

## Oljan kann elva til óhepnar avleiðingar

Vinstraflokkurin í Noregi ávarar myndugleikarnar ímóti at loyva oljufeløgunum at fara undir at vinna gass og olju í Barentshavinum.

Flokkurin heldur, at alt ov lítið er gjørt fyri at kanna, hvørjar avleiðingar oljuvinnan kann fáa á økið, og í einari landsfundarsamtykt um vikuskiftið vísti flokkurin eisini á, at aterkar lokalar kreftir í Norðurnoregi eru ímóti oljuvinnu í Barentshavinum, tí tað kann fáa óhepnar avleiðingar.

Tí heldur Vinstri, at myndugleikarnir eiga at seta fleiri kanningar í verk, og at einki oljuvirksemi verður, fyrr enn úrslitið av øllum kanningunum er greitt. Flokkurin sigur, at talan er ikki bara um, hvørja ávirkan oljan kann fáa á umhvørvið, men eisini á búsetingarmynstrið í Norðurnoregi.

## Diana fær minnislund

Diana prinsessa, sum doyði í einari ferðsluvanlukku í París í 1997, fær nú eina minnislund í London.

Býarmyndugleikarnir í London hava gjørt av, at prinsessan skal fáa eina minnislund í Hyde Park. Minnislundin verður sum ein fótbóltsvøllur til støddar við rennandi vatni og blómum, og kostnaðurin liggur um 34 milliónir krónur. Ein amerikanskur arkitektur hevur teknað minnislundina, sum ætlandi verður liðug á sumri næsta ár.

Diana prinsessa var sera væl umtókt millum bretar, og síðani hon doyði hevur tað verið eitt fólkakrav, at hon skuldi fáa ein minnisvarða.

# Leypa á Irak um tvær ella tríggjar vikur

**Amerikanarar og bretar fara at leypa á Irak seinni í hesum mánmaðinum, sama hvat ST-trygdarráðið sigur.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*




*Um vikuskiftið vóru nógvar mótmælisgongur ímóti ætlanini at leypa á Irak. Hendan myndin er úr flógvalandinum Bahrein, har fleiri túsund fólk mótmæltu krígsætlanini. Fimti amerikanski herflotin hevur støð í Bahrein í hesum døgum*

*Mynd: Reuters*

Hóast amerikanskir og bretskir diplomatar alment royna at gera tað, sum gerast kann, fyri at fáa hini limalondini í ST-trygdarráðnum at taka undir við tí seinasta Irak-uppskotinum, hevur atkvøðugreiðslan ongan veruligan týdning. Tí USA og Bretland hava longu gjørt av at leypa á Irak um tvær ella tríggjar vikur.

Tað skrivar bretska blaðið The Dilay Telegraph, sum sigur seg hava tíðindini frá ónevndum ráðharrum í Blair-stjórnini.

- Álopið kemur seinni í hesum mánaðinum. Um tvær ella tríggjar vikur. Ikki seinni, verður ein av ráðharrunum endurgivin fyri at hava sagt við blaðið.

# Hann veit helst hvar bin Laden er

**Amerikanarar vóna, at tann tikni Khalid Sheikh Mohammed kann geva teimum upplýsingar um, hvat Al-Qaeda ætlar, og hvar vin Laden er**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

-Hatta var óført!

George W. Bush, forseti var ovurfegin, tá trygdarráðgevi hansara, Condoleezza Rice, kunnaði hann um, at pakistansku myndugleikarnir høvdu tikið sjálvan Khalid Sheikh Mohammed í býnum Rawalpindi leygardagin.

Sambært amerikanskum fjølmiðlum vóru tað embætismenn, sum arbeiða fyri amerikansku fregnartænastuna CIA í pakistanska høvuðsstaðnum Islamabad, sum høvdu kunnað pakistansku løgregluna um, at tann kendi yvirgangsmaðurin var í Rawalpindi.

Khalid Sheikh Mohammed verður hildin at vera tann triðovasti leiðarin í al-Qaeda. Amerikanararnir vilja vera við, at tað var hann, sum legði atsóknirnar tann 11. september í 2001 til rættis, og teir halda eisini, at sami maður skipaði fyri atsóknini at amerikanska herskipinum "Cole". Somuleiðis verður hildið, at tað var Khalid Sheikh Mohammed, sum gav boð um at myrða amerikanska tíðindamannin Daniel Pearl í Pakistan fyri einum ári síðani.

Kendi yvirgangsserfrøðingurin Magnus Ranstorp á lærda háskúlanum St. Andrews í Skotlandi er ikki í iva um, at handtøkan kann fáa alstóran týdning.

- Hann hevur lyklarnar. Hann veit um allar ætlanir, sum eru lagdar, hvør er uppií, og hvar teir eru. Hetta er ein rættiligur frammaná hjá al-Qaeda, tí Khalid Sheikh Mohammed er bindiliðið millum al-Qaeda og allar teirra menn kring heimin, segði Magnus Ranstorp við New York Times í gjár.

Longu sunnudagin ljóðaði, at pakistanar høvdu flýggjað amerikansku myndugleikunum Khalid Sheikh Mohammed, men tað avsannaði pakistanski innanríkisráðharrin seinni. Hann legði afturat, at pakistanar ætla sær at avhoyra mannin, áðrenn støða verður tikin til, hvat skal henda honum.

Amerikanskir embætismenn dylja ikki fyri, at teir eru ovurfegnir eins og forsetin.

- Maðurin kann avdúka allar ætlanir, og so veit hann ivaleyst eisini, hvar Osama bin laden er, sigur ein embætismaður.

ítróttur
Nr. 43 • týsdagur • 4. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Toppdystur uttan dómara



*Kappingarleiðarin hjá HSF sigur, at Hondbóltssambandið hevur sent fráboðanir um dystin út í góðari tíð. Tað sama sigur Stjørnan seg hava gjørt, men dómararnir hava onga fráboðan fingið*

**Tað mundi koma illa við hjá bæði Stjørnuni og VB, at eingin dómari var komin til Klaksvíkar, tá kanska avgerandi dysturin í FM-stríðnum hjá VB skuldi spælast. Brek á samskiftinum tykist vera orsøkin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eingin dómari er komin!

Hetta var støðan, tá Stjørnan og VB sunnudagin gjørdu seg til at spæla dystin, sum kanska skuldi verða avgerandi fyri gullánirnar hjá VB, samstundis sum dysturin hevði stóran týdning fyri stríðið hjá Stjøruni um bronsumerkini.

Hetta er fyrstu ferð í ár, at slík hending er komin fyri, men tíðspunktið kundi neyvan verið valt verri. Bara tað at støðan er íkomin, er í sjálvum sær nakað, sum ongan tíð kann góðtakast, men til ein slíkan dyst...

### Samskiftisbrek

Tað er líkt til, at øll miseran um væntandi dómararar er íkomin av eini røð av brekum í samskiftinum millum dómarar, heimalið og hondbóltssambandið.

Í øllum førum siga bæði HSF og Stjørnan, at tey í øllum førum hava røkt síni fráboðanarskyldu, meðan dómararnir hinvegin siga seg ikki vita av nøkrum.

Kappingarleiðarin hjá HSF, Jógvan Martin Mørk, sigur at dystaryvirlitið til bæði dómarar og feløg verður sent umvegis teldupost í góðari tíð. Fyri eini fjúrtan døgum var tó greitt, at onkur broyting mátti gerast, tí ein flogbóltsdystur skuldi spælast í Klaksvík, samstundis sum dysturin millum Stjørnuna og VB stóð á skránni, men eisini hendan broyting er fráboðað øllum pørtum.

Í Klaksvík vilja tey eisini vera við, at alt er gjørt, soleiðis sum tað skal.

Formaðurin í hondbóltsdeildini hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag, Geir Wardum, sigur at tey kanska kundu havt sagt dómarunum umvegis telefon, men hinvegin heldur hann ikki, at hetta skuldi verið neyðugt.

- Vit hava sent fráboðanirnar út umvegis teldupost. Vit kundu kanska havt sagt frá umvegis telefonina, men hinvegin hava vit nú nýtt teldupostin heilt leingi, og tað hevur alla tíðina rigga væl, so tú mást spyrja dómararnar um, hví teir ikki vóru á staðnum, sigur Geir, sum annars sjálvur var dómari í dystinum.

Hin dómarin í dystinum var annars Egil Steintórsson, sum av arbeiðsávum er búsitandi í Klaksvík í løtuni, eftir at hann annars í nógv ár hevur búleikast í Vági. Soleiðis vóru tað tveir dómarar við tilknýti til hvør sítt felag, sum stóðu fyri dømingini, og sum skilst á lagnum, so gekk hendan eisini væl.

### Eingin fráboðan komin

Høvuðspersónarnir í málinum tykjast sostatt at vera dómararnir, sum av HSF vóru settir at døma dystin.

Sambært yvirlitinum skuldu hesir vera Jákup Símun Simonsen og Hallur Danielsen úr H71, men hesir siga seg ongan tíð hava fingið nøkur boð um at koma til Klaksvíkar at døma.

- Eg plagi vanliga at fáa ein teldupost við teimum dystum, sum vit skulu døma, men hesa ferð havi eg so einki fingið at vita. Hvørki frá HSF ella Stjørnuni, segði Jákup Símun Simonsen, tá vit mánadagin fingu orð á hann.

- Og eg dugi væl at síggja, at hatta er ein keðilig støða, sum eg harmist um er íkomin, men stórt meira enn tað, fái eg so ikki gjørt. Høvdu vit fingið boðini, so vóru vit sjálvandi farnir avstað, er einasta viðmerkingin, sum Jákup Símun hevði um málið.

Hvussu var og ikki, so spældi alt tó so toluliga væl av. Men hendingin sjálv má í øllum førum seta spurnartekin við, hvussu fráboðanarskyldan skal verða framyvir. Í meldrinum av kunningum, sum ferðast umvegis alnetið er í øllum førtum skjótt, at ein fráboðan ella ein teldupostur verður burtur.